# Sig so at royking ikki er góð fyri okkurt

**Picasso varð føddur lívleysur. Jarðarmóðurin visti sær eingin ráð at bjarga honum – men pápabeiggin visti ráð: Hann blásti tubbaksroyk niður í pinkubarnið, sum fór at hosta – og bjargaðist**

SPANIAFERÐ
*Eli Smith, listarmaður*



### 5. og seinasti partur

Langa Fríggjadag 14. apríl kl. 10 fór eg við tokinum úr Bilbao móti Barcelona. Hugsaði túrurin fór at taka einar tveir tímar, spurdi so síðumannin, hvussu leingi. Hann segði heilar 9 tímar, so hettar var ikki nakað snartok vit fóru við.

Men mær dámar væl at koyra í toki, hevði tikið mær eina tjúkka bók við at lesa um lívið hjá Billi Graham, so vit kundu koyrt bæði aftur og fram uttan at eg hevði kett meg.

Á leiðini eysturyvir fara vit gjørgnum tann fruktagóða Ebrodalin. Har rennur ein av teimum størstu áunum í Spaniu, "áin Ebro". Henda á hevur eitt ómetaligt ríkidømi við sær. Á veg inn í landspartin Aragonien hava vit bæði verið gjøgnum Navarra og Rioja landspartarnar, sum eru kendir fyri sítt framúrskarandi vín. Forrestin Navarra, hvørs landspartahøvðusstaður er Pampilona, er kendur fyri sína tarvarenning.

Eg veit ikki, um tit hava sæð í sjónvarpinum, at fólk í hvítum klæðum við reyðum belti og hálsturriklæði renna alt tað, tey eru ment gjøgnum býin undan villum tarvum á veg til arenaina at verða dripnir. Hettar er so víðakent og væl umtókt, at tað koma fólk kring allan knøttin at vera við til henda øra leik, sum er fra 6. til 14. juli. Steðgaðu eina løtu í býnum Zaragoza, sum er tann 5.størsti í Spaniu og liggur í landspartinum Aragonien (610.000 íbúgvar) Iberar grundløgdu hann, men varð seinni doyptur av Rómverjum til "Caesaragusta".

Í Spania er vatnið at meta við gull, av tí at ikki øll støð í landinum fáa tað vatn, teimum tørvar, Spania er eisini tað landið í Evropa, sum nýtur flest pening fyri at gera byrgingar og vatnleiðingar til støð, har vatntrot er. Tíðum stends klandur millum landspartarnar, hvaðani nú vatnið skal leiðast, og tá er tað stjórnin í Madrid, sum má siga, hvaðani vatnið skal fara. Serliga er tað á háslættanum, at vatnið trýtur. Ebroáin er tann einasta stóra áin, sum rennur út í Miðalhavið, meðan hinar allar renna út í Atlantshavið. Sum vit fluttu okkum eysturyvir, komu vit inn í eitt annað landslag, meiri avsviðið og óskipað. Jørðin er heldur reyðari her enn longur vesturi.

Áðrenn vit vita av, síggja vit tað vælkenda Miðalhavið. Fyrsti býurin vit koma til er Tarragone, sum liggur á eysturstrondini við 113.000 íbúgvum, og er ein av teimum elstu býunum í Spaniu. Hann angar av rómverskari søgu og jarðfrøði, men er eisini ein býur, sum livir her og nú. Iberarar, sum hálvoyggin er uppkallað eftir, var eitt fólkaslag, sum kom úr Norðurafriku og búsettu seg her vegna tað góða útsýni hernaðarliga. Nú koyrdu vit norðureftir framvið strondini móti tí katalanska høvðusstaðnum og næststørsta býnum í Spania "Barcelona", hvørs jarnbreytarstøð eitur "Sans". Her sá eg stórar fólkmongdir ganga í allar ættir, og tíðum hoyrdi tú snjallar røddir siga eitthvørt umráðandi í hátalarunum. Nú var at finna mær okkurt náttarskjól. Hevði lisið í bókini "Og turen går til Spanien", at ein kundi finna okkurt bíligt stað í síðugøtunum tætt við jarnbreytina.

Eg leitaði og hugdi eftir "hostel", sum teir kalla tað, á føroyskum eitur tað nokk vallaraheim, men einki fann eg. Tað var við at verða seint og eg at troyttaðist at ganga og bera mína tungu tasku. So eg setti meg á ein bonk, og hugdi aftur í bókina. Fann eitt tlf.nr á einum hostelli tætt við høvðusgøtuna og ringdi. Jú, har var pláss. Sum var tað gott at tørna inn, hóast hettar var eitt kamar við 8 seingjum. Her vóru fólk úr øllum hornum jarðarinnar: japanarar, italiumenn, kanadiubúgvar, meksikanarar, chilenarar og fransmenn. Haldi hettar var gott fyri meg eftir at hava livað eina einbúgvaratilveru í bilinum. Dagin eftir, hevði eg nokk at gera við at greiða teimum frá um Føroyar. Hevði fingið greiðar faldarar frá frímerkjadeildini við frágreiðingum og myndum úr Føroyum. Hettar kom sera væl við.

Dagin eftir fór eg mær ein túr fyri at kanna eftir. Tað var bara ikki sum at siga tað, hettar var ein stórbýur uppá 1,7 mill fólk, sum eisini var grundlagdur av iberarum. Ein tann ríkasti og mest evropeiski býurin í Spaniu. Gekk inn á tað so víðakendu boulevardina " Ramblaðina," sum er ein stór gongugøta millum Placa de Catalunia og havnina, har ið 59 metra høga standmyndin av sjófararanum Columbus er, sum bjartskygdur stendur á einum globusi og peikar vestur í hav. Tað er so at siga altíð lív í hesu gøtu, ja, tað er sum at vera á ólavsøku hvønn dag her. Fólk streyma støðugt eftir gøtuni fyri at handla, eta ella hyggja eftir fólkum og øllum teimum mongu gøtuartistum, sum sanniliga duga sítt fag. Har eru eisini nógv fólk í teimum nærliggjandi gøtunum. Rambla merkir á arabiskumm "fossur", nakað sum støðugt streymar. Har vóru handlar av alskins slag, sum royndu av øllum alvi at freista keyparan Hettar minti meg ikki sørt aftur á gamlar, góðar dagar, tá vit plagdu at selja ís, bróstsukur og paraplyir í Ullvøruhúsinum á ólavsøku. Her sær tú øll fólkasløg úr øllum stættum, sum royna at koma sær fram á besta hátt. Hendan fitta, lítla konan á myndini tosaði so hart í fartelefonini, at fólk steðgaðu á við einum brosi og eygleiddu hesa konu, sum virkaði ikki sørt stolt av, at hon eisini dugdi at tosa í fartelefon. Sunnudagin, fyrsta páskadag, fóru kirkjuklokkurnar at ringja til gudstænastu beint yvirav har eg búði, so eg fór innar og upplivdi eina fulla kirkju . Mínsantin sá eg ikki telefondamuna aftur við skriftarstólin. Spania er eitt katólskt land, men hevur ikki altíð verið tað. Í ár 711 komu arabisk herlið úr Afriku til tað Iberisku hálvoynna. Eftir bert fáum árum løgdu teir tað mesta av Spaniu undir seg. Teir ætlaðu sær eisini longur norður eftir við tí muslimsku trúnni, men har var tað Karla Magnus, sum vit kenna frá kvæðunum, ið steðgaði teimum. Forrestin so liggur Runsival (Roncesvalles) beint norðanfyri áðurnevnda bý " Pampilone".

Dagin eftir var eg og vitjaði Picasso savnið, sum vísti eitt úrval av hansara fyrstu verkum, til hann fór til París. Verkini hjá honum vóru sýnd fram í einum stórum gotiskum bygningi frá 1300 talinum.

Pablo Picasso búði í Barcelona frá tí hann var 14 ára gamal til hann var 23 ár. Har fekk hann eisini sína listarligu utbúgving.

Í 1881, í einum lítlum húsi í Malaga, sá listamaðurin Pablo Picasso fyrstu ferð dagsins ljós við fyltum lungum av royki. Føðing hansara heima við hús hevði verið trupul, og ljósmóðurin sá ongan møguleika at bjarga tí nýfødda Pablo. Mammubeiggin, sum var lækni, royndi at hjálpa til. Við einfaldum snildi blásti hann sigarroyk í andlitið á tí deyðadømda dronginum, sum brádliga sló eyguni upp og byrjaði at gráta. Sig so, at royking ikki er gott fyri okkurt.



*59 metur høga standmyndin av Columbusi í Barcelona*



*Her sær tú øll fólkasløg úr øllum stættum, sum royna at koma sær fram á besta hátt. Hendan fitta, lítla konan á myndini tosaði so hart í fartelefonini, at fólk steðgaðu á við einum brosi og eygleiddu hesa konu, sum virkaði ikki sørt stolt av, at hon eisini dugdi at tosa í fartelefon*